UTTAN ÚR HEIMI

## Arbeiðspláss horvin

Síðani á nýggjárinum eru umleið 3.000 arbeiðspláss horvin í danska ídnaðinum, skrivar Industriens Dagblad, sum er limablaðið hjá danska ídnaðarfelagnum.

Í fjør varð roknað við, at danir fóru at missa umleið 5.000 arbeiðspláss í ídnaðinum í ár, men tølini vísa, at tað verður uppaftur verri, sigur Michael Bay Hansen, sum er búskaparfrøðingur hjá Dansk Metal. Hann vísir á, at í fjør bleiv talið 5.000 mett at vera í hægra lagi, men tað sigur bara, hvussu nógv verri tann veruliga gongdin er, sigur hann við Industriens Dagblad.

Ein uggi er tað kortini, at arbeiðsloysið er minkandi, og tað vísir, at tey, sum missa arbeiðið í ídnaðinum, fáa arbeiði í tænastuvinnuni ístaðin fyri.

## Nú kunnu teir revsast

Við sjey atkvøðum fyri og einari blankari hevur hægstirættur í Argentina gjørt av, at tvær lógir, sum góvu heryvirmonnum og øðrum frá einaræðistíðini grið, stríða ímóti grundlógini.

Onnur lógin er frá 1986 og hin frá 1987, men tjóðartingið samtykti fyri tveimum árum síðani at seta tær úr gildi. Tað bar í sær, at fleiri heryvirmenn vórðu tiknir og dømdir fyri ymisk brotsverk í teimum árunum, tá herurin ráddi í Argentina. Kortini hava fleiri rættarmál bíðað eftir avgerðini hjá hægstarætti, men nú hon er komin, verða hesi málini tikin uppaftur, skrivar AP úr Buenos Aires.

Umleið 12.000 fólk vórðu myrd ella hvurvu í einaræðistíðini. Higartil eru umleið 3.000 heryvirmenn avhoyrdir, og roknað verður við, at umleið 400 teirra verða ákærdir fyri eitt nú burturflytingar, píning og morð.

Argentinski forsetin, Nestor Kirchner, hevur sagt, at samfelagið fer at gera upp við ta óhugnaligu fortíðina, og at øll sek verða revsað. Hann er fegin um avgerðina hjá hægstarætti. Hon vísir, at lógir, sum forða samfelagnum at rættarsøkja fólk fyri grov brotsvrk, eru ikki sambæriligar við vanliga rættaruppfatan, sama hvussu gamlar tær eru, sigur forsetin.

## Nýtt snarflogfar

Japanar og fransmenn eru vorðnir samdir um at byggja eitt flogfar, sum skal flúgva skjótari enn tey væl kendu Concorde-flogførini, sum góvust at flúgva fyri tveimum árum síðani eftir at hava flogið í 27 ár.

Nýggja snarflogfarið skal hava pláss fyri 300 ferðafólkum, og tað skal hava so stóra motororku, at tað skal kunna flúgva upp til fimm ferðir skjótari enn ljóðið, skrivar AFP úr París.

Avtalan ímillum japanar og fransmenn varð undirskrivað fyrradagin. Tey næstu trý árini fara partarnir at brúka góðar 30 milliónir krónur til at menna ætlanina, áðrenn hon av álvara verður sett í verk.

## Stórt avlop

Norðmenn útfluttu í mai vørur fyri 52 milliardir norskar krónur, og tað gav eitt stórt avlop á handilsjavnanum.

Innflutningurin í mai var 29 milliardir krónur, og tað var næstan 18 prosent meiri enn í sama mánað í fjør. Men vøksturin í útflutninginum var uppaftur størri ella 22,5 prosent, sigur hagstovan í Oslo. Úrslitið var eitt avlop á handilsjavnanum upp á 23 milliardir krónur.

Vøksturin í innflutninginum í mai stavar millum annað frá, at norðmenn keypa fleiri bilar nú enn í fjør. Í mai keyptu norðmenn bilar fyri næstan 460 milliónir krónur meiri enn í sama mánað í fjør, men innflutningurin av jarni, stáli og telduútgerð vaks eisini, sigur hagstovan.

# Kann enda í ruðuleika



*ES-formaðurin Jean-Claude Juncker hevði ætlað, at samveldið skuldi taka stór stig í hansara formanstíð, men tað hendir neyvan*

**Eingin fíggjarlóg og ongar fólkaatkvøður um ES-grundlógina í bræði. Tað kann gerast úrslitið av ES-toppfundinum.**

LAGNUFUNDUR
*Árni Joensen*
*fatekst@mail.dk*

Síðani fólkaatkvøðurnar í Fraklandi og Niðurlondum um ES-grundlógina hava fleiri samanborið toppfundin í Bruxelles í dag við eina jarðarferð. Tá var talan um, at ES-grundlógin skuldi jarðast, men nú kann fundurin eisini gerast jarðarferð hjá viljanum til samstarv og ikki minst samanhald.

- Eg eri rættiliga vísur í, at vit fáa onga langtíðarfíggjarætlan á hesum fundinum, segði forsætisráðharrin í Luksenburg, Jean-Claude Juncker, á einum fundi við ES-tinglimir fyrradagin. Juncker er formaður í ES í løtuni, og hansara fremsta mál hevur verið at fáa fíggjarlógina samtykta sum eitt tekin um, at samveldið virkar enn, sjálvt um fransmenn og niðurlendingar vrakaðu grundlógina.

Men tað er ikki grundlógin, sum er tann stóri stríðsspurningurin.

Ætlanin var, at fundurin í Bruxelles skuldi leggja ein langtíðarfíggjarætlan fyri árini frá 2007 til 2013, men nú er ymiskt komið í vegin. Hini 24 londini við Jacques Chirac á odda krevja, at Bretland skal missa tann serliga avsláttturin, sum landið hevur havt í meiri enn tjúgu ár. Men Tony Blair hevur svarað, at tað kemur ikki upp á tal at skerja avsláttturin, fyrr enn londini semjast um at endurskoða landbúnaðarstuðulin. Tað vil Chirac ikki hoyra talan um, og teir seinastu dagarnar hevur ósemjan elvt til alment kegl ímillum London og París.

### Varandi kreppa

Jean-Claude Juncker hevur einki ímóti at skerja landbúnaðarstuðulin, men hann tekur eisini undir við kravinum um at skerja tann bretska avsláttturin. Fyrradagin segði hann, at hvørki av málunum verður loyst á fundinum í Bruxelles, men kortini hevur hann lagt eitt semingsuppskot fram.

Eftir tí skal tann bretski avsláttturin haldast á sama støði, sum hann var, áðrenn tey mið- og eystureuropeisku londini komu upp í samveldið. Á tann hátt fáa bretar vissu fyri, at avsláttturin verður ikki skerdur fyrr enn í fyrsta lagi ftan á 2013, men teir skulu eisini fáa vissu fyri, at landbúnaðarstuðulin verður endurskoðaður tá. Juncker viðgekk, at hann hevur ikki tær bestu vónirnar um semingsuppskotið.

Formaðurin í ES-nevndini, José Manuel Barroso, hevur eftir øllum at døma heldur ikki tær bestu vónirnar um toppfundin.

- Vit mugu vísa teimum evropeisku borgarunum, at teir kunnu hava álit á skipanini. Megna vit ikki tað, kemur samveldið í eina varandi kreppu, segði Baroso við tíðindamenn fyrrakvøldið.

### Tíð at hugsa

Í gjárkvøldið skuldu ríkis- og stjórnarleiðararnir royna at finna eina semju um, hvat skal gerast við ta ætlaðu grundlógina. Teir seinastu dagarnar hevur Jean-Claude Juncker roynt at eggja hinum leiðarunum til at halda fast um, at tey einstøku londini skulu halda fram við sínum góðkenningum, sjálvt um fransmenn og niðurlendingar hava sagt nei, men í gjár segði hann seg ivast í, at tað letur seg gera. Ein orsøk kann vera, at sambært teimum seinastu meiningakanningunum er mótstøðan ímóti grundlógini vaksin nógv ímillum hansara egnu í Luksenburg.

Barroso hevur eisini verið talsmaður fyri, at hini londini eiga at taka støðu til grundlógina uttan mun til úrslitið í Fraklandi og Niðurlondum, men mikukvøldið segði hann við franska sjónvarpið France 3, at nú ræður um at vera ansin.

-Tað rætta er helst, at fólk fáa tíð til at hugsa seg um, segði hann.

Danska stjórnin heldur fyribils fast um, at fólkaatkvøða verður um ES-grundlógina tann 27. september, men Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, hevur sagt, at tað er treytað av, hvat kemur burtur úr fundinum í Bruxelles. Tí danir skulu vita, hvat teir atkvøða um, sigur hann.